# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Fáa gongd á tennis aftur

Havnar Tennisfelag hevur nú umskipað seg, og ætlanin er nú veruliga at fáa gongd aftur á tennis-spælið her á landi.

Nú í summar verður skipað fyri venjingum í tennis, og fer hetta fram hvønn mánadag klokkan 17.30, har øll áhuga hava møguleika at royna seg. Tað er tó treyt, at hesi fyrst tekna seg sum lim í felagnum, verður sagt í tíðindaskrivi.

**-mørk**

## Spæla seinni í Sarpugerði

Vanliga verða fótbóltsdystir í fremstu deildini í Sarpugerði spældir klokkan 15 sunnudag. Soleiðis verður tað ikki hesa ferð.

Sunnudagin fer oddaliðið EB/Streymur at vitja Víking. Fyrsta bríkslið verður ikki klokkan 15, men í staðin klokkan 17. Sambært dómarayvirlitinum hjá FSF verður Eiler Rasmussen 23. maðurin á vøllinum í Sarpugerði.

**-mørk**

## Metløn til týskarar

Týsku landsliðsspælararnir í fótbólti hava longu vissað sær eina metstóra bonus-upphædd fyri luttøkuna í EM-endaspælinum. Við at vinna seg fram til finaluna hevur hvør av spælarunum tryggjað sær 150.000 evrur ella á leið 1.25 milliónir krónur. Vinnur Týskland finaluna, verður samlaða upphæddin til spælararnar á leið 2 milliónir krónur. Tað er tó lítið fyri at rokna í mun til tað, sum týska fótbóltssambandið fær fyri luttøkuna. Higar til er parturin hjá Týsklandi í UEFA-pengum komin upp á 142 milliónir krónur.

**-mørk**

# Potemkin er sendur til hús

**Í B36 hava tey ikki verið nøgd við úrtøkuna hjá ungverska áleyparanum, sum nú er sendur til hús. Avtala er ístaðin skrivað við enska Sam Malson, sum hevur vant við hesa vikuna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Karoly Potemkin fekk bara 12 dystir í Formula-deildini fyri B36. Í árstalsfelagnum hava tey ikki verið nøgd við avrikini, og tí er spælarin nú sendur til hús*

Fýra mál í 12 dystum. Tað er úrtøkan, sum Karoly Potemkin hevur havt í Formula-deildini. Og tað er ov lítið hjá B36, sum hevði størri ætlanir enn sum so við ungverjanum, tá teir í vetur skrivaðu undir sáttmálan.

- Vit hava ikki verið nøgdir við úrtøkuna hjá liðnum seinastu tíðina, og hetta er so ein avleiðing av hesum.

Tað sigur Havgrímur Johannesen, sum er ein av teimum, ið tekur sær av Formula-hópinum hjá B36.

Seinastu vikuna hevur B36 havt ein breta til royndarvenjingar. Sam Malson er navnið á hesum, og 21 ára gamli áleyparin hevur hesa seinastu vikuna sannført tey í B36 somikið nógv, at tey ikki ivast í, at hetta er maðurin, sum kann hvessa álopið hjá B36. Enn eru øll pappírini tó ikki komin upp á pláss hesum viðvíkjandi, og tí er bretski áleyparin ikki við hópinum, sum fer at spæla stevnudyst í Runavík leygardagin.

Havgrímur Johannesen leggur afturat, at talan møguliga verður um at knýta onkran annan spælara afturat hópinum, nú flytingarvindeygað er opið.

Víkingur-EB/Streymur:

# Tronligt í Sundalagnum

**Nýggju donsku spælararnir vera við í Gøtu, og miðvallarin Høgni Zachariassen venur aftur við fullari ferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EB/Streymur er suverent oddalið. Eftir tólv umfør hava teir ikki tapt, og eftir HB sigurin á Skála mikukvøldið er fjarstøðan aftur til næsta kappingarneytan, um tað ber til at kalla tað soleiðis, tíggju stig!

Hóast sannførandi plássið á tindinum á støðutalvuni, so fer EB/Streymur sunnudagin at bjóða Víkingi av við nýggjum vápnum. Danski álopsspælarin Peter Foldgast vandi fyrstu ferð við Margáir í Streymnesi mikukvøldið, og Anders Post, sum er verjuspælari og eisini kann gerast styrkur á verjukendum miðvallarplássi, vandi fyrstu ferð í gjárkvøldið. Teir var báðir á dómaraseðlinum sunnudagin.

Sorin Anghel noyddist av vøllinum og varð seymaður síðsta sunnudag í Klaksvík. Hann verður tøkur sunnudagin, og tað kann væl vera, at Høgni Zachariassen verður á listanum. Hann hevur vant við fullari ferð, og harvið hevur Sigfríður Clementsen positivan trupulleika. Fleiri spælarar, sum ivaleyst høvdu verið uppløgd val at vera millum teir fyrstu ellivu í flestu av hinum feløgunum, mugu finna seg í at skula hita beinkin í Sarpugerði.

Tað verður jarðarferð í Gøtu sunnudagin. Tí verður fyrsta bríkslið millum Víking og EB/Streym ikki fyrrenn klokkan 17.

Eftir kærkomna 2-0 heimasigurin á ÍF og trivaliga 5-0 sigurin á Sandi var tað stórt vónbrot hjá Víkingi at leggja rygg til tap á Svangaskarði. Gongdin seinastu vikurnar er undirstrikin av, at tað hevur verið nógv upp og niður hjá Víkingi. Spurningurin er nú, um tað hesa ferð verður upp, og um tað harvið fer at eydnast hjá gøtumonnum og leirvíkingum at útinna tað, sum eingin annar hevur megnað í tólv royndum, nevniliga at vinna øll stigini ímóti EB/Streymi.

Hanus Jacobsen hevur ikki vant saman við hinum í hesi vikuni, men hann verður klárur sunnudagin. Tað verður Hans Jørgen Djurhuus eisini. Hann var ikki við á Toftum.